# Væl fyri fíggjarliga

**Húsavík:** Minkandi talið av íbúgvum hevur ikki havt stórvegis ávirkan á fíggjarstøðuna hjá kommununi, sum fevnir um bygdirnar Húsavík, Dal og Skarvanes.

Skuldin hjá kommununi er uppá 1,5 mió krónur, men tað eru kortini tey viðurskifti, ið mugu loysast í næstum og sum fara at kosta pening.

Í løtuni eru kommunan í ferð við at útvega teimum báðum fyrrnevndu bygdunum vatnbrunnar og vatnleiðingar haðani frá. Eftir er so at gera tað sama á hinum báðum støðunum í kommununi - Skarvanes og húsini ið standa í Djúpadali, beint við Skarvanes.

Eitt annað arbeiði eru so kloakkviðurskiftini. Henda loysning fer eisini at krevja nógv av kommunukassanum, men hetta er kortini eitt arbeiði sum má og skal gerast.

**sb.**

# Fara aftur at skemta sær

**Sandur:** Nú verður serstaka føustlávints-skemtið aftur framført á Sandi.

Hetta hendir eftir ein fund í ungmannafelagshúsinum Virkinum á Sandi, har hetta málið varð umrøtt. Og sum skilst á Sandoyarportalinum vóru 20 fólk møtt á fundi, har væl kom burturúr.

Líkt er til, at fólk hava saknað hetta skemtið, sum ikki hevur verið á breddanum seinastu tvey árini. Og tí samdust tey um at taka henda táttin uppaftur í ár.

sb.

# 7:1



*Sandur: Í góðveðrinum mikudagin vóru nøkur av børnunum í barnagarðinum á Sandi farin útum eina løtu at hugna sær. Eitt av teimum stuttligu tingunum úti í garðinum er stóra reiggjan, ið kann rúma nógvum børnum. Á myndini, sum myndamaður okkara, Jens Kristian Vang tók, siggjast tey sjey børnini í somu reiggju: Ronja, Klara, Tórhild, Jóhanna, Filip, Jógvan Jón og Fríbjartar.*

*snorri@sosialurin.fo*